Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum gjørdu 40 ára dagin hjá Búnanum so hugnaligan. Tøkk fyri blómur og til tykkum, sum stukku inn á gólvið.

Blíðar heilsanir
Amalia

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri stóru samkenslu og hjálpsemi, ið varð sýnd okkum, tá ið okkara kæra momma, vermomma, omma og langomma

Alma Joensen
Sumba

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk tit mongu, sum vitjaðu hana og spurdu eftir henni, tá hon bleiv sjúk.
Eina stóra tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum passaðu hana so væl.
Tøkk til kirkjutænarar.
Tøkk tit mongu, sum hjálptu til til jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Missiónshúsið. Tøkk til sangarar og til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

Hjartans tøkk øll somul.

Elsebeth, Kristina, Danjal Pauli og Fríðbjørg

Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

Hans Petur Hansen
Hósvík

andaðist og varð jarðaður.

Fyri tey avvarðandi
Ella við familju

†

Kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Nanna Elisabeth Olsen
fødd Højgaard
á Hellu á Toftum

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi hósdagin 10. apríl 86 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík í Fríðrikskirkjuni leygardagin 12. apríl kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni sunnudagin 13. apríl kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Axel, Gunnar, Josefina og Poul Johan

Tey, ið ynskja at minnast Nannu kunnu lata eina gávu til »Heim til eldri« á Toftum – konto í peningastovnunum.

www.sosialurin.fo

Ferðavinnan skiftir ham

Nýggja búmerki hjá Ferðaráð Føroya ímyndar fjøll, ið daga upp úr havinum

Eitt nýtt búmerki. Ein nýggj heimasíða. Og ein sniðhandbók, ið leggur leistin fyri, hvussu ein umfatandi skelting um allar Føroyar skal fara fram í næstum. Hetta vóru arbeiðsamboð, sum Ferðaráð Føroya kundi almannakunngera, nú føroyska ferðavinnan eftir øllum at døma stendur fyri stórum avbjóðingum

FERÐAVINNA
Ingi Rasmussen

»Síggj Føroyar við nýggjum eygum«.

Við hesum orðum bjóðaði Ferðaráð Føroya til tíðindafundar á Hotel Føroyum fríggjadagin, nú tað stundar til enn eitt ferðavinnuár í Føroyum.

Á tíðindafundinum kundi ein errin stjóri í Ferðaráðnum, Heri Niclasen, avdúka nýggja andlitið hjá Ferðaráðnum, eitt nýtt búmerki, sum Ingvør Nolsøe frá Stephanssonhúsi hevur latið gjørt.

Nýggja búmerkið ímyndar grønar summarklæddar føroyskar oyggjar, sum stinga seg upp úr bláa havinum mitt í Atlantshavinum. Har Ferðarráðið fyrr kallaði seg »Faroe Islands Tourist Board« verður nú bert sagt »Faroe Islands« við bláum stavum, sum skulu ímynda havið.

– Tað gamla navnið var ov langt og ringt at marknaðarføra. Hetta er einkult og greitt og sigur hvat tað er, vit bjóða fram, sigur Ingvør Nolsøe.

Aftan fyri ryggin

Grasgrønar líðir, gjáir, hav, vón og summar eru lýsingarorð, sum the grand lady í føroyska reklamuheiminum knýtir at nýggja búmerkinum.

Sum skilst hava starvsfólkini á Ferðaráðnum umbiðið nýggja búmerki aftan fyri ryggin á stjóranum. Og ikki fyrr enn eitt búmerki var gjørt, løgdu tey tað fram fyri stjóran.

– Eg havi onki ímóti, at fólk arbeiða aftan fyri mín rygg, tá úrslitið er so positivt. Eg fall beinanvegin fyri hesum búmerkinum. Hetta er ein verdigur avloysari fyri okkara verandi búmerki, sigur Heri Niclasen, stjóri.

Nýggja andlitið boðar samstundis frá, at Ferðaráðið arbeiðir við einum nýggjum samleika. Umframt nýggja búmerkið, so arbeiða Stephanssonshús og Ferðaráð Føroya eisini við at gera ein nýggjan imagefaldara, sum skal loysa tann gamla av.

Øktir møguleikar

Ferðavinnan í nýggjum hami. Nýggjur samleiki. Eitt hamskifti. Hetta vóru alt orð, sum stjórin í Ferðaráðnum tók fram, nú ferðavinnan í Føroyum við Ferðaráðnum á odda ætlar at ganga nýggjar leiðir.

Nýggjar og stórar avbjóðingar liggja fyri frammran, m.a. tí at nýggja Norrøna er farin at sigla, og tað merkir fleiri og kræsnari ferðafólk. Og tí er umráðandi at gera ein vørr beint nú.

– Sæð frá einum altjóða sjónarhorni bendir alt á, at møguleikarnir hjá Føroyum komandi árini at gera seg galdandi í kappingini um ferðafólkini sýnast rættiliga góðir. Onki kemur tó av sær sjálvum, og vit mugu taka avbjóðingarnar í álvara. Tað verður avgerandi fyri, um Føroyar megna at gagnnýta sítt tilfeingi og møguleikarnar, sum marknaðirnir bjóða. Eitt er at fáa ferðafólk til landið, eitt annað er at lúka krøvini hjá ferðamanninum til gistingar, dygd og áhugaverdar upplivingar av alskyns slagi, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum.

Alt á einum staði

Ein fortreyt fyri at standa seg í kappingini, er at veita dygdargóða tænastu á øllum økjum í ferðavinnuni. Heilt ítøkiliga hevur Ferðaráð Føroya nú ment ein nýggjan portal, sum varð latin upp á Hotel Føroyum fríggjadagin. Hann er at finna á www.visit-faroeislands.com. Hann er ikki heilt liðugur enn, men eitt nú er ætlanin, at tað við tíðini skal bera til hjá ferðafólki at seta túrar saman á heimasíðuni. Heimasíðan skal geva føroysku ferðavinnuni ein felags samleika, og alt skal savnast á einum stað.

Umframt heimasíðuna, so varð ein sniðhandbók til skelting lødd fram, sum skal syrgja fyri, at ferðamaðurin í Føroyum framefter fær nógv betri leiðbeining enn higartil.

Tað er Tórálvur Weihe, arkitektur, sum hevur havt ta uppgávuna um hendi.

Skeltingin í fastar karmar

Øll skelting til ferðavinnuna skal framefter gerast eftir einum felags leisti. Tórálvur Weihe, arkitektur, hevur gjørt eina sniðhandbók fyri Ferðaráð Føroya

FERÐAVINNA
Ingi Rasmussen

Fríggjadagin handaði Ferðaráð Føroya Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, eina sniðhandbók, sum í minsta smálut leggur fastar karmar fyri, hvussu skeltingin í Føroyum skal fara fram í ferðavinnuhøpi.

Tað er Tórálvur Weihe, arkitektur, sum hevur staðið fyri arbeiðnum. Endamálið við sniðhandbókini er at geva øllum pørtum, sum fáast við skelting, eitt felags grundarlag at arbeiða við.

Skeltingin skal síggjast sum ein partur av samlaðu kunningini av ferðafólkum, sigur Tórálvur Weihe. Tað er av týdningi ikki at yvirskelta, men at geva ta kunning, sum tørvur er á hjá tí ferðandi.

Skipanin umfatar skelti við alment upplýsandi tilfari (eitt nú um landið, ávísa økið og bý ella bygd), skelti við serliga upplýsandi tilfari (eitt nú bygdagøtur, fornminni ella áhugaverð stað) skelti til staðarnøvn og minni skelt til eitt nú nátthús.

– Ramman til skeltini er úr eiktræi. Tað tolir samband við jørð, fellur væl inn í náttúruna, er haldgott og fær ein vakran lit við tíðini, sigur Tórálvur Weihe.

Bjarni Djurholm landsstýrismaður fegnaðist um tiltakið við einum skeltingarpolitikki.

Tórálvur Weihe (v.m.) hevur gjørt sniðhandbók til skelting. Heri Niclasen, stjóri í Ferðaráðnum, kundi bæði leggja fram nýtt búmerki, portal og handa sniðhandbókina á tíðinafundi fríggjadagin. Aftanfyri síggjast nýggju skeltini
Mynd: Jens K. Vang